# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

# Neistin ella VB

**Eitt sera tungt og kroppsliga krevjandi vikuskifti stendur VB leikarunum fyri durum, men megna tær at standa stinnar, so sær væl út hjá VB, ið mangan hevur staðið í finalu móti Stjørnuni, tey seinastu árini**

*Leygardagin skal VB spæla dyst á Skála, og sunnudagin, minni enn eitt samdøgur seinni, skulu tær spæla avgerðandi dyst í Havn, um finalusessin í FM, ið eftir øllum sólarmerkingum at døma, verður móti krútsterku Stjørnuni úr Klaksvík*



HONDBÓLTUR
*Niels Petersen*
*niels@sosialurin.fo*

Tað kann tykjast undrunarsamt, at VB kvinnurnar eru settar at spæla ein dyst leygardagin, og at tær so sunnudagin skulu spæla avgerandi dyst um finalusess í FM-stríðnum. Man tað vera av tilvild, ella hvat er tað, ið er hent, standa ivaleyst nógv í Suðuroynni og spyrja seg, nú VB-kvinnunum stendur einum sera strævnum vikuskifti í møti.

### Undarlig ásetan av dysti

Seinastu árini hevur tað verið ein dystur millum Neistan og VB, um eina finalusessin í FM, og við hesum í huga, kann tað tykjast undrunarsamt, at ein so týdningarmikil dystur verður lagdur minni enn eitt samdøgur eftir ein dyst hjá einum av liðunum.

Hvussu er og ikki, so verður sunnudagurin ivaleyst avgerandi løtan í stríðnum um seinna finaluplássið.

Vinnur Neistin, ella fær bara javnt, so sær heilt væl út hjá bláu havnagentunum, meðan tað hinvegin er eitt ófrávíkiligt krav til VB, at um tær ikki vinna, so tapa tær stríðið um finalusessin.

### Styrkisroynd

Hjá kvinnunum eru tað sostatt tvey lið, sum hava eitt sokallað dupult vikuskifti. T.e. tá eitt lið spælur tveir dystir, og talan er tá um StÍF og VB. StÍF tekur móti VB í morgin, og sunnudagin taka tær móti VÍF, meðan Vágskvinnur fara til Havnar.

Av sonnum má man siga, at hetta er vorðið sum styrkisroynd hjá serliga suðuroyarliðnum.

### Favoritsigrar í væntu

Hjá monnunum verða bert tveir dystir um vikuskiftið, og eru tað tey bæði oddaliðini, StÍF og Neistin, ið hava heimadystir móti ávíkavist VÍF og KÍF.

Við allari virðing fyri bæði KÍF og VÍF, so sær tað út til at spyrjast tveir heimasigrar burturúr hesum vikuskiftinum, og um so verður, so er tað ein optimal upphiting hjá Neistanum, undan brakinum um Havnina í næsta vikuskifti, tá Kyndil og Neistin bresta saman. Tá fæst samstundis endaliga at vita, um Kyndil skal megna at innheinta grannarnar.

# Seyðhundakapping

**Úrslitini frá seyðahundakappingini á Viðareiði 23.02.2008**

Tveir teir bestu hundarnir í klassa 3 hava kvalifisera seg til HM í

Wales í heyst, teir eru:

1. Kjell Nattestad, Mykines, við Snøgg og Eyðstein Jensen, Tórshavn, við Meg. Annars vóru úrslitini hesi, og tilsamans 36 hundar luttóku í hesum trimum kappingunum.

Dómari var Julie Hill úr Skottlandi. Sunnudagin hevði Julie Hill skeið á Viðareiði, har yvir 30 luttakarar vóru.

Steypini latin av Samskip
Stuðlar: MBM og Borg




*Vinnarar og luttakarar sum fingu steyp í seyðhundakappingini á Viðareiði seinasta leygardag. Aftast frá vinstru: Eyðstein Jensen, Tórshavn, Julie Hill, dómari, Skotland, Kjell Nattestad, Mykines, Bogi Slættanes, Tórshavn og Oyvindur Brimnes, Argir. Húkandi frá vinstru: Michael Johan Heinesen, Toftir og Per Joensen, Kvívík*

**Klassi 3:**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1. | Kjell Nattestad | Mykines | Snøgg |
| 2. | Eyðstein Jensen | Tórshavn | Meg |
| 3. | Eyðstein Jensen | ----------- | Nap |
| 4. | René Hansen | Nólsoy | Kvess |
| 5. | René Hansen | --------- | Taff |
| 6. | Poul Falkvard | Sørvágur | Tweed |
| 7. | Absalon Hansen | Tórshavn | Fleet |
| 8. | Poul Falkvard | Sørvágur | Dan |
| 9. | Absalon Hansen | Tórshavn | Mirk |
| 10. | Absalon Hansen | ----------- | Jim |
| 11. | Erik Heinesen | Bøur | Fenja |

**Klassi 2:**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1. | Michael J. Heinesen | Toftir | Loki |
| 2. | Bogi Slættanes | Tórshavn | Dimm |
| 3. | John Haldansen | Vestmanna | Taff |
| 4. | Esmar Sørensen | Viðareiði | Scott |
| 5 | Leon Sólheyg | Klaksvík | Sam |
| 6. | Jens P Jensen | Tórshavn | Diva |
| 7. | Búi Holm | Bøur | Skúgvur |
| 8. | Hanus Højgaard | Tórshavn | Ron |

Klassi 1:

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1. | Oyvindur Brimnes | Tórshavn | Trilla |
| 2. | Per Joensen | Kvívík | Bob |
| 3. | Michael J Heinesen | Toftir | Tess |
| 4. | Dan Olsen | Rituvík | Gael |
| 5. | Per Joensen | Kvívík | Kvark |
| 6. | Búi Holm | Bøur | Skúgvur |
| 7. | Tróndur Petersen | Viðareiði | Mai |
| 8. | John Haldansen | Vestmanna | Nike |